# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

*Administration of Occupational Safety and Health*

Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands

Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo



*Skrásetingar nr.:*

**L-C007-3**


# Leiðbeining um borð- og formatrundsagir til træsmíð

Borð- og formatrundsagir skulu nýtast við skili eftir reglunum í arbeiðaraverndarlógini og kunngerð um teknisk hjálpartól v.m., sum Arbeiðseftirlitið umsitur.



Fig. 1



Fig. 2

Ein borðsag er ein rundsag við sagblaði, har sjálv sagin stendur still undir nýtslu, og við sagaksli undir borðinum.

Ein formatrundsag er ein borðrund-sag, sum er útgjørd við rulluborði ella sleðu, ætlað til koyring av arbeiðsevni.

Borð- og formatrundsagir skulu verða innrættaðar og nýtast við skili eftir arbeiðaraverndarlógini og kunngerð um teknisk hjálpitól, sum Arbeiðseftirlitið umsitur.

***Brúkaravegleiðing*.**

Fyri allar útveganir (sølu, leigu og lán) skal skrivlig vegleiðing fylgja við, sum er orðað á føroysk-um ella donskum, við frágreiðing um nýtslu og viðlíkahald.

***Lógarheimild:***

Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.
Kunngerð nr. K-E015-1 um innrætting av tekniskum hjálpartólum frá 4. september 1995.


***Útgivið fyrstu ferð:***

**21. mai 1988**

***Seinastu broytingar:***

**23. januar 1996**

***Innrættningur (útgerð).***

Borð- og formatrundsagir skulu hava

- spalteknív
- yvirverju
- undirverju

Spaltuknívurin skal tryggja:

- at spenningur í viði ikki trýstir sagsporið saman um blaðið soleiðis, at evnið verður tveitt aftur,
- at tilfarið ikki aftaná nertir við tindarnar á sagblaðnum,
- at eingin persónur kann koma í samband við tindarnar á sagblaðnum, t.d. tá tikið verður frá,
- at tann sum arbeiðir við sagina, ikki fær nomið við sagtindarnar, sum venda uppeftir.

Spaltuknívurin skal verða úr passandi harðleika.

Knívurin skal vera grovari enn blaðið og klænri enn sagsporið, og so breitt at tað er nóg treyst. Jaðarin skal hava skap eftir ummátinum á sagblaðnum.

Knívurin skal lættliga kunna stillast í hædd eins og í longd soleiðis, at frástøðan millum tindar og knív er hægst 3 mm, og loddrætti fjarleikin millum eggina á knívinum og tað ovasta á sagblaðnum er hægst 5 mm.



Fig. 3

Har borð ella sagaksa kann stillast i hæddini, skal festið á spaltuknívinum vera soleiðis innrættað, at stillingin á knívinum í mun til tindarnar ikki broytist.



Fig. 4

Við stillingini skal spaltuknívurin

spennast so fast, at hann ikki vikast, meðan arbeitt verður.

Yvirverjan skal fjala tindabløðini mest møguligt, móti óneyðugum sambandi. Yvirverjan skal hava hettuskap. Sí strikumynd 4.

Undirverjan skal fevna um blaðið undir borðinum, um hetta ikki er gjørt í konstruktiónini. - Sí strikumynd 1.

Undirverjan kann hava skap sum spónhetta. Opið fyri saguspønunum skal vera minst 120 mm frá tindabløðunum.

Yvir- og undirverja skal vera innrættað soleiðis
- at hon tolir ta ávirkan, sum hon er ætlað at megna,
- at spønir o.a. ikki hevur lyndi at setast fast.

Stýrið til blaðið, sum verður stillað meðan sagin virkar, skal vandaleyst kunna handfarast.

Hvør sag sær, skal hava nullspenningsfráfall, sum forðar fyri at hon fer í gongd, tá streymslit ella ólag er á ljósnetinum. Innkøkingin skal vera nærindis byrjunartakførinum.

Byrjunar- og steðgitakføri skulu verða lætt atkomulig.

Byrjunartakføri skal tryggjast móti ávirkan uttanífrá. Tað kann gerast við:
- at startknøtturin verður koyrdur niður, yvirlokaður ella útgjørdur við kraga,
- at snúningsavbrótarin er útgjørdur við kraga, uttan so at konstruktión og lega hindra ótilætlaðum ávirkanum.

Ein bremsa skal vera, um blaðið ikki steðgar seinast 10 sekundir eftir at maskinan er avbrotin.

***Nýtsla.***

Yvirverja, spaltuknívur og undirverja skal nýtast, meðan maskinan gongur. Yvirverjan kann tó takast burtur við fjaldum sniðum, t.d. í not- og falsuarbeiði, har evnið í slíkum arbeiðsstøðum, fer inn um tindarnar á sagblaðnum. Tá hetta arbeiði er liðugt, skal yvirverjan straks setast upp á pláss.

Strikumynd 5 vísir dømi, hvussu ein forsvarligur framferðarháttur við fjaldum sniði, kann gerast.



Fig. 5

Verður evnið drigið fram við el-hjálp, skal henda útgerð

fjala sagablaðið.



Fig. 6

Tað er umráðandi:
- at spaltuknívurin hevur røttu tjúkd og bunga ið mun til sagblaðið,
- at spaltuknívurin er rætt stillaður, strikumynd 3,
- at yvirverjan er stillað so nær evninum, sum gjørligt,
- at stoydpinnur við handtaki verður nyttur, har vandi er fyri at koma í samband við tindarnar.



Fig. 7

Tá sagblaðið verður skift út, skal aksilin haldast fastur við fullgóðum lásiútgerð.

***Viðlíkahald.***

Rundsagir skulu viðlíkahaldast soleiðis, at tær altíð eru góðum standi. Ávísing um eftirlit og viðlíkahald, sum útflýggjarin letur, skulu haldast.

Sagblaðið skal verða hvast .

Sagbløð við rivum í, mugu ikki nýtast. Møgulig umvæling skulu serkønir gera.

***18 ára aldursmark.***

Ungfólk undir 18 ár mugu ikki arbeiða við rundsagum. Serligar reglur eru tó galdandi fyri lærlingar og næmingar.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ,** 21. mai 1988

Eli Davidsen